# BROT ÚR 2004



## KYNDIL Í SÍÐSTA SEKUNDI

Tað vóru tvey sekund eftir á klokkuni, tá ið mest avgerandi brotskastið í hondbóltskappingini 2003/2004 skuldi takast. Jónleif Sólsker tveitti bóltin í málið, og tað gjørdi Kyndil til føroyameistarar í manshondbólti.

*Mynd: Álvur Haraldsen*



## TAÐ RÆÐUR AT BLÁSA

Tónleikur setir stóran dám á føroyska samfelagið, og virksemið er bæði fjølbroytt og viðfevnt. Tað var nógv at fegnast um í føroyskum tónleiki 2004, og tað var eisini okkurt at flenna eftir – sum her norski skemtarin og tubaspælarin Eirik Gjedevik undirhelt á Musikkstevnuni.

*Mynd: Jens Kristian Vang*



## SANGFUGLAR Á GØTUSANDI

Tríggjar av songkvinnunum, sum hava verið nógv frammi síðsta árið, hittust ein dag í Gøtu. Petsi Tvørfoss, Eivør Pálsdóttir og Arnfríð Lützen eru allar uppvaksnar í Gøtu, men í dag eru tær farnar í hvør sína ætt. Tónleikin hava tær tó allar framvegis til felags.

*Mynd: Jens Kristian Vang*



## KVINNURNAR Í FINALUNA

Føroyska kvinnulandsliðið í hondbólti stóð seg sera væl í altjóða kapping í Italia. Føroyska liðið kom púra óvæntað í finaluna, har tær tó taptu fyri italsku vertunum. Føroysku spælararnir vóru tó sera væl nøgdir við avrikið, sum var nógv betur enn væntað var frammaundan.

*Mynd: Álvur Haraldsen*



## FÓLKAHAV Á FESTIVALI

Eini 4000 fólk vóru til stóru útikonsertina á fyrsta Summar Festivalinum, sum varð hildin í besta summarveðri í Klaksvík. Á pallinum undirhildu nøvn sum Ken Hensley, Boney M, Frændur, Hjarnar og Rag Rags

*Mynd: Álvur Haraldsen*



## AFTUR HB

Tað var ein fegin Rúni Nolsøe, sum kundi taka ímóti føroyameistarasteypinum í fótbólti frá Óla Holm. HB vann í 2004 FM fyri triðju ferð á rað, og tað mundi verða besta løtan í árinum, har felagið í Havn og javnaldrin í Klaksvík fyltu 100 ár.

*Mynd: Álvur Haraldsen*